## Einskiljingin av Føroya Banka nærkast

Tað kann hugsast, at meirilutin av partabrøvunum í Føroya Banka verður seldur longu í fyrstu partabrævasøluni, sum verður í ár.

Tað sigur formaðurin í nevndini í Fíggingargrunninum frá 1992, Eyðun á Rógvi.

Við útvarpið í gjár segði Eyðun á Rógvi, at um ikki so langa tíð fer nevndin í grunninum at kunngera eina tíðarætlan fyri einskiljingina.

Løgtingið samtykti 2. mai í 2006, at Føroya Banki skal seljast og skrásetast á virðisbrævamarknaði. Síðani hevur Fíggingargrunnurin, sum eigur 99,4 prosent av bankanum, fyrireikað søluna. Grunnurin hevur valt svenska Handilsbankan sum ráðgeva í einskiljingartilgongdini.

Deildin hjá Handelsbanken, Capital Markets í Keypmannahavn, hjálpir Fíggingargrunninum at skriva prospekt um Føroya Banka, virðismeta bankan og skipa fyri skrásetingini á føroyska virðisbrævamarknaðinum og Københavns Fondsbørs.




# Tvey lógaruppskot í part

**Eftir at løgmaður boðaði frá, at landsstýrið fer at koma við nøkrum eykauppskotum, nú valskeiðið lækkar móti endanum, hevur Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna, gjørt av at seta fram munnligan fyrispurning um málið**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*



Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin, heldur, at hetta ljóðar sum um løgmaður er komin í neyð av manglandi politiskum avrikum, og at samgongan hevur droppað alt sum eitur búskaparligt vit og skil.

Tí hevur hon gjørt av at seta fram fyrispurning til Jóannes Eidesgaard, løgmann, eftir at hann í Sosialinum verður endurgivin fyri at siga, at allir landsstýrismenninir sleppa at koma við tveimum eyka uppskotum, nú valskeiðið líðir móti endanum. Annita á Fríðriksmørk sigur í munnliga fyrispurninginum, at tá ið løgmaður í Sosialinum verður spurdur, hvat hann fer at brúka hetta síðsta árið til, verður hann endurgivin fyri at siga, at samgongan og landsstýrismenninir eru í tí hepnu og óvanligu støðu, at hava ein góðan meiriluta, umframt at fíggjarliga støðan í landinum er betri enn væntað, tá ið samgonguskjalið varð undirskrivað. Og hon vísir beinleiðis til brot úr greinini við prátinum við løgmann:

– Tí hava okur í landsstýrinum gjørt av, at hvør landsstýrismaður kann koma við einum ella tveimum eyka uppskotum. Annita vísir eisini á, at løgmaður sigur, at uppskotini fara at koma borgarunum til góðar, soleiðis at talan verður um beinleiðis tilboð ella betran av tænastuni.

### Droppað vit og skil

Og Annita peikar á, at løgmaður sigur, at hetta verður ikki gjørt tí at valið nærkast.

– Men nú hava vit møguleika at nýta hugflogið og harvið koma við góðum politiskum hugskotum. Og tíðin er um at renna út, sigur løgmaður við Sosialinum og var endurgivin nakrar ferðir í útvarpinum.

– Og so verður hann enntá endurgivin fyri at siga, at hann ikki vil avdúka nakað um, hvat vit kunnu vænta okkum, sigur Annita á Fríðriksmørk. Hon heldur, at hetta ljóðar sum um løgmaður er komin í neyð av manglandi politiskum avrikum, og at samgongan hevur droppað alt sum eitur búskaparligt vit og skil.

– Nú fáa landsstýrismenninir serverðan ein landskassa, sum sambært fíggjarmálaráðharranum flýtur í pengum. Hendan landskassa kunnu teir so nýta til at rinda eini tvey lógaruppskot við. Ongin ætlan ella krøv um, at hesi uppskot skulu minka um gjónna millum samfelagsbólkarnar, ella at hesi uppskot skulu menna føroyska vinnulívið, ella heilsuverkið ella aðrar vælferðarskipanir, sigur Annita á Fríðriksmørk.

### Ongar treytir

Og hon greiðir víðari frá, at einasta treyt sum løgmaður hevur sett sambært blaðnum og útvarpinum, er, at hesi uppskot skulu koma borgarunum til góðar.

– Ein treyt, sum øll kunna verða samd um frá ultra høgra til longst til vinstru. Ein setningur, sum typiskt er felagsnevnari har sjónarmiðini eru rættiliga ymisk, men sum sigur akkurát onki, sigur løgtingskvinnan í munnliga fyrispurninginum. Hon staðfestir víðari, at úttalilsini kunnu fáa álvarsligar avleiðingar, um ikki løgmaður megnar at stýra samgonguni og fíggjarmálaráðharrin megnar at sita tyngri á kassanum jú meir rennur í hann.

### Fýra spurningar

Tí hevur Annita á Fríðriksmørk gjørt av at seta fram soljóðandi fyrispurningar:

Er løgmaður rætt endurgivin, tá ið loftmiðlarnir um miðjan januar, søgdu frá løgmanni, at nú stóð so væl til í samfelagnum, at landsstýrismenninir fingu møguleika at leggja eini tvey lógaruppskot fram í part, hetta til valskeiðið var at enda komið.

Um hetta er rætt endurgivið, kundi verið áhugavert at fingið at vita: Hevur løgmaður sett treytir fyri lógaruppskotunum, aðrar enn, at hesi skuldu tæna borgarunum í landinum?

Hvussu er løgmaður komin fram til, at talið tvey lógaruppskot er tað rætta fyri samfelagið?

Er slíkur hugburður frá ovastu leiðslu við til at tálma sveiggini í búskapinum?

# Fýra spurningar frá Tórbjørn Jacobsen

POLITIKKUR

Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður Tjóðveldisfloksins, fer á tingfundinum í morgin at seta fram fýra fyrispurningar til Bárð Nielsen, Jógvan á Lakjuni og Bjartna Djurholm

Spurningurin til Bárð Nielsen er soljóoðandi:

1) Nú, táið eitt kollektivt landsstýrið hevur samtykt, at landsstýrismenninir hvør einsæris kunna koma niðan í tingið við einum ella tveimum lógaruppskotum hvør, tað ið eftir er av hesum valskeiðnum, sambært Sosialinum og løgmanni, tí at tað hevur gingist so ovurhonds gott hesi árini hann hevur sitið, kann landsstýrismaðurin, ið fyri kortum boðaði frá í Vinnuvitan, at landið flýtir í hunangi, tá greiða tinginum frá, um landsstýrið samstundis hevur sett eitt hægstamark fyri, hvussu stórar samlaðu meirútreiðslurnar kunna vera orsakað av hesum møguligu lógaruppskotum og hevur landsstýrið yvirhøvur politiskan og fíggjarligan dekning í samgonguni (í tinginum) fyri hesi ætlan?

Tórbjørn Jacobsen hevur eisini tveir spurnignar til Jógvan á Lakjuni, sum eru soljóðandi:

2) Sambært lógaruppskotum, ið landsstýrismaðurin í mentamálum hevur sent til hoyringar, skilst, at danska hermegin og tess prestar og danskt mál skula hava serligar heimildir, sersømdir, ella rættari rættindi ájavnt við føroysk áhugamál í lógarkarminum, sum skal vera galdandi fyri føroysku fólkakirkjuna, eftir at hon er yvirtikin, væntandi á Ólavsvøku í ár. Kann landsstýrismaðurin greiða tinginum frá, hvør orsøkin er til hesar ásetingar, stendur hann sjálvur aftanfyri lógartekstin og viðmerkingarnar ella eru heimildirnar komnar inn í uppskotið eftir kravið frá myndugleikunum sum nú sita við lógarvaldinum á økinum?

3) Nær verður málsligur ráðgevi settur í Kringvarpi Føroya, soleiðis sum fyriskrivað er í nýggju kringvarpslógini?

Fjórði spurningurin er til Bjarna Djurholm, og hann er soljóðandi:

4) Nógv hóvasták og at kalla øll umsitingarorka landsins hevur verið nýtt til eina visiónsætlan, hvørs mál ætlandi skula vera rokkin í árinum 2015. Strategibólkurin fyri infrakervið hevur barslað sítt uppskot, og fremsta mál teirra fyri 2015 er, sambært visiónsheimasíðuni, at ferðatíðin til Havnar skal í mesta lagi vera 1 – ein – tími, har landfast er. Kann landsstýrismaðurin greiða tinginum frá, hvaðar tað er longri enn 1 tími, at ferðast til Havnar í landfasta økinum, sum nú er, í 2007, og hvussu skal hesin tímin skiljast? Hetta er í hvussu er høvuðsniðurstøðan hjá bólkinum, er yvirhøvur neyðugt hjá vaksnum fólki, at brúka so stóran kapasitet og so nógva fundarorku, bara fyri at koma við tilmælum, sum eftir øllum at døma eru rokkin fyri fleiri árum síðani.

